# Nú liggja teir bestu borð um borð

**Lagt er upp til tættar og spennandi kappingar, tá ið bestu bátarnir frá Norðoyastevnuni fara at liggja borð um borð á Skálafjørðinum**

FM RÓÐUR Á EYSTANSTEVNU
*Jóannes Hansen*

Tað slitnar ikki sundur í hesum róðrarárinum. Tað verður kappast seks vikuskifti á rað, áðrenn tað verður stuttur steðgur undan Ólavsøkuni. Í dag er annar FM róðurin á skránni, og hesa ferð fara teir bátarnir, sum stóðu seg best í Klaksvík, at liggja borð um borð og mitt í feltinum.

Eftir Norðoyastevnuróðurin hevur tað ikki verið frítt, at tað enn eina ferð hevur verið uppi og vent, at tað er óheppið, at startrøðin í fyrsta róðrinum verður avgjørd við lutakasti. Møguleikin er tá størri fyri, at umstøðurnar ikki eru tær somu hjá øllum. Sum so mangan áður hevur verið nevnt at t. d. bygdarstevnan á Skála átti at verið kvalifikatión til plaseringarnar á Norðoyastevnu.

Hetta er ein spurningur, sum bara feløgini eiga rættin at taka støðu til, og tað kunnu tey bara gera á aðalfundinum. Í dag eru teir bestu í miðjuni, og so fæst at síggja, hvussu tað fer at tørna út, og um úrslitini fara at verða øðrvísi, enn tey vóru fyri einari viku síðani.

## Stórur áhugi og gott mál

Á Norðoyastevnu var áhugin fyri róðrinum ógvuliga stórur. Áskoðarafjøldin var væl størri, enn hon ofta hevur verið í Klaksvík. Á heimasíðuni hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, krf.fo, vita tey at siga, at tað leygardagin vitjaðu eitt sindur fleiri enn tvey túsund á heimasíðuni.

Úrslitini í fyrstu FM kappingini leggja upp til, at áhugin ikki verður minni hesa ferð. Eitt nú í kappingini millum 10-mannaførini, har tað hesa ferð verður kappast á 2000 metrum. Í Klaksvík var longsti teinurin 1500 metrar.


*Meðan lutakast avgjørdi, hvar bátsmanningarnar lógu í fyrsta FM-róðurinum í ár, fara bestu bátarnar frá Norðoyastevnu at liggja borð um borð á Skálafjørðinum*

Tá ið tað verður róð á Skálafjørðinum eru umstøðurnar góðar at fylgja við hjá áskoðarunum. Endamálið er, tá ið tvær stengur eru yvir eitt. Onnur er á bryggjukantinum, og hin er á húsunum hjá Skipafelagnum. 2000 metra málið er inni á Langanesi. 1500 metra málið er á Bakka, og 1000 metra málið er uttanfyri gomlu stønna á Glyvrum, sum er niðan fyri Støkkhøllina.

## Vertirnir ein sigur

Kappróðrarfelagið NSÍ telist millum tey stóru, og teir hava ofta vunnið nógv. Á Norðoyastevnu luttóku teir við sjey manningum, og teir vunnu ein sigur. Tað vóru dreingirnir umborð á nýggja 5-mannafarinum, Spógvanum, sum vunnu.

Tað er FM kappróður í Runavík annað hvørt ár. Tvær tær seinastu ferðirnar hava teir í Kappróðrarfelagnum NSÍ vunnið eina ferð. Í 2002 vann Eysturoyingurin, og í 2000 vann Tjaldrið við dreingjum.

Á fyrra partinum av róðrarteininum í Klaksvík tóktist Eysturoyingurin at ætla sær at vera við í kappingini, men so steðgaði heilt upp hjá teimum. Í dag hava teir møguleikan í heimasjógvi at vísa, hvør dugur er í teimum.


*Havnarbáturin vann 10-mannaførini á Norðoyastevnu. Spennandi verður um hann kann endurtaka bragdið á Eystanstevnu um vikuskiftið.*

Mynd: Álvur Haraldsen






Vikuskifti

Nr. 110 • leygardagur • 12. juni 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Politikkur sum lærugrein í fólkaskúlanum



Tinghellan á s. 4–5


*Tiltakið hjá felagnum arm og beinbrek eydnaðist heilt væl, og øll lótu væl at*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Gloymdi bólkurin hugnaði sær

Seinasta vikuskiftið skipaði Felagið arm og beinbrek fyri einum tiltaki í Kvívík. Børn og vaksin, limir og stuðulslimir, øll hugnaðu og stuttleikaðu sær saman leygar og sunnudagin. Eitt av endamálum felagsins er at varpa ljós á tann bólkin í samfelagnum, sum tey lýsa sum tann gloymda

TILTAK
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Fólk við arm ella beinbreki hittust í Kvívík seinasta vikuskifti. Tað var felagið arm og beinbrek, sum stóð fyri hesum, og var endamálið fyrst og fremst at gera vart við, at felagið er til.

– Hetta er tann fyrsta uppgávan hjá nevndini í felagnum, sum varð koyrd av bakkastokki, sigur Martin Karl Olsen, næstformaður í felagnum.

Hann sigur, at hetta tiltakið var bara fyri at fáa eina byrjan og letur hann væl at.

– Øll hugnaðu sær, og tað var eisini ætlanin.

Felagið hevur eisini givið út eitt blað til sínar limir, har ymiskt tilfar um arm og beinbrek er í. Ætlanin er, at hetta blaðið skal koma út tvær ferðir um árið, og verður tað bert givið limum, sum nú er.

## Gloymdur bólkur

Martin Karl heldur, at tey, ið hava arm og beinbrek, eru ein gloymdur bólkur í samfelagnum. Hann vísir á, at nógvastaðni eru umstøðurnar hjá fólki við breki serstakliga vánaligar, tá hugsað verður um atkomu møguleikarnir.

– Nógvir almennir stovnar kunnu vit als ikki koma inn í, og tað er ov galið, slær hann fast.

Og tað var nevniliga atkomuviðurskiftini, sum gjørdu, at tiltakið varð lagt júst í Kvívík.

Martin Karl sigur, at atkomumøguleikarnir í Kvívíkar skúla eru heilt góðir, og tað at fimleikarhøll og svimjihøll eisini eru á staðnum, gjørdi tað bara enn betur.

– Á tann hátt var okkurt til øll, sigur Martin Karl.

## Vegleiðing

Men tað er ikki bert til stuttleika, at felagið arm og beinbrek skipar fyri slíkum tiltøkum. Martin Karl sigur, at tað eru nógvir ósvaraðir spurningar hjá fólki við breki, og vónar hann, at felagið kann verða við til at vegleiða og ráðgeva hesum viðvíkjandi.

Leygardagin greiddi hann frá ymsum venjingum, og eisini vísti hann nakrar venjingar, sum fólk kunnu gera.

– Tað eru mong, sum eiga protesur, men til dømis sita tey í koyristóli, tí tey ikki duga at nýta tær, og tað er spell, heldur Martin Karl, sum sjálvur bert hevur eitt bein. Tað sást tó næstan ikki á honum, og tað er tí, at hann fór til Danmarkar at venja seg uppaftur eftir óhappið, sum gjørdi, at hann misti annað beinið.

– Eg lærdi nógv í Danmark, og haldi eg eisini, at eg havi okkurt, sum eg kann føra víðari frá tí, sum eg lærdi, sigur hann.

Martin Karl sigur, at hetta helst verður eitt afturvendandi tiltak hjá felagnum, men um tað verður aftur í Kvívík ella ikki, dugir hann ikki at siga nakað um.

– Felagið vil millum annað arbeiða fyri, at okkara limir fáa eina góða uppliving, og at tey fáa ráðgeving og vegleiðing. Eisini vilja vit verða við til at menna Føroyar so líðandi til eitt samfelag til øll, og at glæman verður vend móti teimum føroyingum, sum onkursvegna hava sitið í skugganum, sigur Martin Karl Olsen at enda.